## Starvsfólk til Mylnuna



Nú nýggja Mylnan letur upp við Smyrilsvegin verður søkt eftir fólki M/K til fulltíðarstarv, at arbeiða aftaná skúlatíð og at arbeiða í vikuskiftinum- at byrja fyrst í juli. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara.

Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

mylnan

Send umsóknina til:
Mylnan, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.


# Frits Johannesen í Bagsværd kirkju



Sunnudagin 12. juni letur Frits Johannesen upp málninga- og vatnlitsframsýning í Bagsværd kirkju, Keypmannahavn. Framsýningin letur upp kl. 11.00 eftir gudstænastuna og hongur uppi fram til 1. september.

# 200 decibel á Meiarínum

**TÓNLEIKUR**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Føroya fólkakærastu punkarar, bólkurin 200 spæla hóskvøldið konsert á Meiarínum. Talan er ikki bert um vanliga konsert, men eisini um upptøku, sum kann enda sum livefløgan "200 Decibel". Við sær á Meiarínum hava teir festliga punkkenda poppbólkin Lama Sea.

200 hava vunnið nógv hjørtu við tí argandi og kontantu punkrokkfløguni, "Viva La Republica". Ummælini bæði innanlanda og uttanlanda hava verið sera góð, og á 15 teimum bestu hevur bólkurin kroyst seg upp á ovastu rók.

Móttøkan er sambært Niels Arge Galan sangara og gittarleikara heilt ótrúlig. Hann heldur, at á hesi fløguni eru teir bæði grovari og frekari enn nakrantíð fyrr. Teir høvdu væntað at fingið av grovfílini, men ístaðin eru teir nummar eitt á einum hitlista, verða bjóðaðir við á Atlantic Music Event, og spæla enntá konsert í SMS.

Fyrsta fløgan hjá bólkinum "200%" varð útseld, og seldi millum annað væl í Íslandi. Íslendska punk/rokk halgimenni Siggi Punk, segði um fløguna, at man hevði ikki hoyrt punk, áðrenn man hevði hoyrt 200. Eisini í Føroyum vóru ummælini sum heild góð. Men nógv vóru illa fornøgdur, sum kann enda… nermaði av argandi tekstunum og sterkt litaða fullveldisboðskapinum. Millum annað fór Dimma næstan í herna ímóti bólkinum, og tingmenn funnust enntá at teimum á tingsins røðarapalli.

Men Føroyar hava flutt seg. Viva La Republica er enn meira argandi, orðavalið er grovari, men móttøkan er heit og vinarlig. Fólk tykjast at skilja skemtiligu tekstirnar, og børnini elska fløguna. So nógv er broytt, at sjálvt Dimma hevur ummælt bólkin við lovprísan.

Men kanska er tað ikki bara Føroyar, sum hava flutt seg. 200 hava eisini flutt seg tónlistarliga, punkurin er ikki líka punkuttur, og fleiri av løgunum eru heldur rokkur enn punkur. Eisini er ljóðblandið av fløguni nógv vakrari. Óli Poulsen og hansara poppfingrar, hava altíð dugað at snarað knøttarnar á einum miksipulti á popkendan hátt. Hetta hevur hann eisini gjørt á Viva La Republica. Tá man megnar at gera 200 til pop, so dugur man okkurt sum onnur ikki duga.


**OFTARI BÍLIGARI SMIDLIGARI**

## NÓGV OFTARI TIL BRETLANDS

Tvær ferðir um vikuna til Aberdeen og London
Eina ferð um vikuna til Edinburgh



Summarflúgvingin til Bretlands er nú tvífaldað. Ferðamálini eru London, Edinburg og Aberdeen. Vit flúgva til London tvær ferðir um vikuna frá 15. mai til 25. september, til Edinburg eina ferð um vikuna frá 21. mai til 10. september, og til Aberdeen verður flogið tvær ferðir um vikuna.

**Bilegg ferðir hjá:**

MB TOURS Tel 322 121 | ALPHA TRAVEL Tel 352 900
FONN FLOG Tel 456 363 | Faroe Travel Tel 312 600 | FLOGFELAG FØROYA Tel 340 000

ATLANTIC AIRWAYS

flyfaroe.com





**KAWASAKI VN 1500 TIL SØLU**
Árgangur 1998. Nógv eykaútgerð. Bert koyrt 10.900 km.
**Tel. 223366**